# Opratión dagsverk: Hjálp til útbúgving í Krigistan



*Birita Ellevang og Katrin Debes Kristensen arbeiddu á bakarínum hjá Gunnleivi í Havn á OD degnum, sum var mikudagin 2. november*

*Mynd: Birita W Djurhuus*



*Poul Kári Madsen ruddaði fyri Tórshavnar Kommunu í Hoydalsá beint við Studentaskúlan fyri at savna pengar á OD-degnum*

*Mynd: Hanus H. Eysturdal*

**OPERAATIÓN DAGSVERK**

*Birita W. Djurhuus og Hanus H. Eysturdal*

Á hvørjum ári skipa studentaskúlarnir í Norðurlondum fyri einum virkisdegi, sum er ætlað øllum næmingum í studentaskúlum. Dagurin ber navnið od dagur, ið stendur fyri operatíon dagsverk.

Næmingarnir finna sær eitthvørt arbeiði, har tey arbeiða í ein dag. Í ár er tað 2. november, og pengarnir sum næmingarnir fáa fyri arbeiði sítt, verða latnir einum góðum endamáli. Í ár fara pengarnir til útbúgvingarmøguleikar í Krigistan.

Hetta er 20´inda árið, at opratión dagsverk fer av bakkastokki. Síðani 1985 hevur hetta verið eitt sera vælvirkandi tiltak, Síðani 1985 hevur tað danska kongaríkið savnað 100 milliónir saman.

Felagsskapurin od bleiv settur á stovn av tí ársøk, at í 1962 datt tann fyrverandi ST-aðalskrivarið Dag Hammerskjold niður við flogfari í Afrika og doyði.

Hammerskjold var kendur og virdur maður fyri síni avrik, hann hevði framt í teimum fátæku londunum í verðini.

Svenskir næmingar vildu heiðra Hammerskjold og byrjaði tí við, íblástri frá hansara solidarisku tankagongd, Opratión Dagsværk. Od tankin fór so líðandi um alt Svøríki, og síðani kom tað eisini til Danmark, og í 1985 kom tað ein Od nevnd til Danmark.

## Od dagur væl dámdur

Od dagur hevur verið sera væl mótikin í Føroyum, og næstan allir næmingar møta upp og gera sítt til, at pengar koma í kassan, sigur Mads Winther stjórið á Studentaskúlanum í Hoydølum. Hann leggur aftrat, at í fjør var tað danska kongaríki nummar tvey á listanum at samla mest pengar inn, av teimum londum, ið luttóku í OD-dagnum. Um ein ikki møtur upp til Od dagin, verður ein skrivaður fyri fráveru, so hetta er ein skúladagur við eitt sindur øðrvísi skrá. At enda sigur Mads, at hann heldur, at hetta er eitt frálíkt tiltak, at faá tey ungu at hugsa um umheimin og geva sær far um, at ikki er tað øll, ið hava møguleika at faá skúlagongd.

## Út at arbeiða

Katrin Debes Kristinsen og Birita Ellevang eru farnar niðan í Gunnleif at arbeiða á Od dagnum. Tær pakka piparnøtur og eru í full sving, tá ið vit koma at niðan at faa okkum eitt lítið prát við tær báðar.

Birita og Katrin eru 16 ára gamlar og ganga í 1.g í Hoydølum.

Tær halda, at tað er sera gott við einum Od degi, og tær halda, at tað er óført at sleppa at gera okkurt øðrvísi, eisini siga tær, at tað er spennandi at hjálpa øðrum, so onnur eisini fáa møguleika til skúlagongd.

- Tað kennist væl, tá ið tú kann merkja, at tú hjálpir øðrum. Sigur Katrin.

Og hesum tekur Birita undir við.

Tær byrjaðu klokkan 8 á morgi og enda kl 13 seinnapart. Tá hava tær samlað sær 250 kr í part, ið er minstagjald sum krevst.

Poul Kári Madsen gongur í 05u í Hoydølum. Hann og flokkur hansara hava ruddað ánna íð rennur oman Hoydalar.

- Vit møttu kl 8 og ruddaðu ymiskt burturkast. Hetta tók bert uml. ein tíma, men tað var nóg mikið at savna 250 krónur í part, so tað var óført, sigur Poul Kári. Hann heldur, at Od dagurin ikki má detta niðurfyri og vónar, at tiltakið hevur nógv góð ár fyri framman.

## AFS´ari og Od dagur.

Eisini Sosialurin hevur tikið ímóti næmingi 2. november. Tað er 17 ára gamli skiftisnæmingurin Dominik Emde,sum gongur ið 2.g og kemur úr Týsklandi. Hann er komin oman í Miðlahúsið at gera eitthvørt, íð tørvar. Eisini hann heldur, at ein tílíkur dagur er eitt sera gott hugskot, og honum dámar væl, at pengarnir fara til eitt gott endamál, so onnur eisini fáa gleði av hesum.

Sum sagt, er Dominik kiftistnæmingur ígjøgnum felagskapin AFS( The American Field Service), fyri, hann kemur úr Týsklandi, hann vildi royna okkurt nýtt og kom tí til Føroya. Fyrst fekk hann tilboð um at fara til Danmarkar, men hetta var ikki júst tað Dominik hevði havt í huga, Síðani bleiv hann spurdur, um hann hevði hug at koma til Føroya, og tað vildi Dominik fegin. Hann má viðganga, at hann ikki visti nógv um Føroyar, hevði hoyrt um tað, men visti ikki stórt meira enn tað.

Men honum dámar sera væl her, her er ikki so øðrvísi, sum nógv halda. Hann sigur, at studentaskúlin í Hoydølum og skúlin hann gekk á, áðrenn hann kom hiðar, ikki eru so ólíkir. Men maturin og veðrið man vera tað, ið er mest ólíkt, sigur hann við einum smíli.

# FAKTA um OD-dagin

1. OD-dagurin stendur fyri 'Operatión Dagsverk-dagurin'

2. Endamálið hjá OD-degnum er at samla so nógvar pengar, sum møðuligt inn til tey fátøku londini í heiminum.

3. Ì ár er landið, sum samla verður inn til, Kirgistan, eitt land í Miðásia.

4. Miðnámsskúlarnir í Føroyum eru allir við í hesum.

5. Ì 1985 bleiv OD-dagurin settur í stovn í Danmark, tvs. at OD-dagurin hevur 20 ára Jubileum í ár.

6. Grundstovnarin av OD-degnum, var Dag Hammerskjold, fyrrverandi ST-aðalskrivari hjá Svøíki. Dag doyði í 1962 í einum flúgvarastoyti. Dag sjálvur hevði droymt um hendan dagin, men ikki fyrren aftaná hansara deyða, vístu miðnámsnæmingar í Svøríki honum tí respekt at byrja við hesum degnum, sum seinni vísti seg at spreiða seg skjótt til restina av Scandinavia.

7. Ì 1988 var nógv mótstøða komin ímótur OD-degnum, av tí grund at fólk hildu tað ver kommunistiskt propaganda. Næmingar tóku tí eitt privat OD verk upp, stuðla av Bertel Haarder. Hendan privata OD samlingin samlaði 600.000 kr.- inn til Mujahedinrørsluna í Afghanistan, sum er ein rørsla, ið ferð ímótur sovjetherinum.

8. Øll OD-verkætlanir í 80'inum vóru stórar succeðir. Næstan allir næmingar luttóku í OD-degnum, hvørja ferð hann var og fingu samla upp ímótur 5 mill. fyri hvørja kampagnu. Mótstøðan ímótur OD-degnum minkaði og OD-dagurin fekk fastsligið at tað ikki var ein partípolitisk kampagna.

9. Framm til 1992 høvdu skúlarnir fingið boð uppá at skráseta allir næmingar, sum høvdu luttikið í hesum arbeiðinum, men í 1992 skifti Bertel Haarder framburð og skifti OD-dagin til at vera partur av undirvísingini.

Hendan undirvísingin bleiv tikin av, í 1996 av undurvísningsministarinum, Ole Vig Jensen.

Í 2000 fingi næmingar, tann møðuleika at sjálvir velja, um OD-dagurin, skuldi vera partur av árinum, ella ikki.